Stjørnan-Neistin 14-18 (9-10):

# Manuela pilkaði stjørnurn

**Stjørnan fekk bara 9 mál seinastu 47 minuttirnar av steypafinaluni. Manuela Stan Jensen tók mest sum alt, sum varð tveitt eftir henni, og so gjørdist tað Neistin, sum í ár streyk avstað við steypasigrinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Tað man vera langt síðani, at steypafinalan hevur verið somikið málfátæk, sum hon var tað leygardagin. Bara 32 mál í 60 minuttir er ikki tað, sum føroysku kvinnuhondbóltur hevur vant seg við seinnu árini. Og so slettis ikki Stjørnan, sum í fleiri ár hevur verið eksponentur fyri kvikan og undirhaldandi hondbólt.

Fáur mundi ivast í, at Stjørnan var greiður favorittur at vinna finaluna, og fyrstu løtuna var heldur ikki nakað sum helst, sum bendi á, at tær skuldu fáa trupulleikar av nøkrum slag.

Báðir partar tóktust hava stórar trupulleikar við at fáa spælið at hanga saman. Teknisku mistøkini vóru nógv í tali, soleiðis at bólturin ferð eftir ferð varð tveittur burtur.

Neistin fekk tó mótbrekkuna at kenna, tá tær tíðliga í dystinum fingu tvær útvísignar á rað. Við tveimum spælarum í yvirtali lupu favorittarnir upp á 5-1, og so var spenningurin nærum burturi.

**Verjan og Manu**

At Neistin kortini kom aftur í dystin, stóðst serliga av tveimum lutum.

Fyrst og fremst, so fingu tær verjuna at rigga. Mitt fyri sluppu spælararnir hjá Stjørnuni mest sum als ikki ígjøgnum, og við Manuelu Stan Jensen í málinum eru leysir vongspælarar ikki so vandamiklir, sum tær vanliga eru.

Og so gjørdi tað minni, at sjálvt spælið á vøllinum annars var so sum so. Spakuliga togaði Neistin seg uppeftir. Frá at vera fýra mál aftanfyri, vunnu tær seg trý mál framum, og tó at Stjørnan fekk javnað aftur, so tóktust tær bláu vera sálarliga omaná, tá farið var til hálvleiks.

**Manu og Manu**

Og í seinna hálvleiki hildu tær alla tíðina fast. Kanska var dysturin ikki so framúr góður, sum roknast kann við av eini steypafinalu. Men meira enn sjálvt spælið, so verður tað uttan iva avrikið hjá Manuelu Stan Jensen, sum verður standandi í minninum eftir dystin.

Snøgt sagt, so var talan um fantastiskt málmansspæl. Líka mikið, hvat og hvussu Stjørnan royndi, so pilkaði hon tær niður. Sjálvsálitið á reyðu spælarunum mundi eisini minka alt meira, sum dysturin leið. Og at tær reyðu ikki fingu nakað mál



*Alina Olaru var enn einaferð týdningarmesti spælarin hjá Stjørnuni. Men hon varð hildin í sera stuttum tjóðuri av sterku Neistaverjuni*




*Áskoðararnir tustu á vøllin, tá seinasta bríkslið hevði ljóðað. Fyri fyrstu ferð í átta ár hava Neista-kvinnurnar vunnið gull*



*So hvørt sum bjargingarnar hjá Manuelu øktust í tali, gjørdist frøin á Neista-plássunum alt sjónligari*